# Statoilstjórin vónríkur um føroyska olju

**OLJULEITING** – Vit eru vónríkir, tá tað snýr sum um at finna olju og gass við Føroyar, men váðin er eisini stórur sigur ovasti stjórin í Statoil, Helge Lund við Sosialin

Jan Müller
*Stavanger*

Ein av høvuðspersónunum á stóru altjóða oljuráðstevnuni í Stavanger var ovasti stjórin í Statoil, Helge Lund. Hann rekur í dag størstu vinnulívsfyritøkuna í Norðurlondum og eina ta størstu í Europa.

Sosialurin fekk orð á valdsmikla Statoilstjóran, vit spurdu hann, hvørjar vónir Statoil, sum arbeiðir kring allan heim, hevur til at finna olju og gass á føroyska landgrunninum?

-Vit hava havt ta uppfatan, at vit halda, at tað eru nakrir spennandi møguleikar í Føroyum, men hetta er eisini eitt øki, sum enn er lítið kannað, og tí er váðin stórur. Men vit ætla at bora ein nýggjan leitibrunn næsta ár, og so aftur ein í 2012, so tað verður spennandi at síggja, hvussu fer at ganga. Men vit eru vónríkir.

Vit spurdu eisini, um norðmenn og her Statoilfólk hava nakrar serstakar kenslur í sambandi við at leita eftir olju í Føroyum í kjalarvørrinum av, at norskir víkingar komu hagar fyri 1000 árum síðani?

-Tað er greitt, at vit sum vinnulívsfólk mugu fara eftir teimum møguleikunum, sum vit trúgva mest uppá. Men eg má tó siga, at tað hevði verið eyka gott, um vit gjørdu eitt fund í Føroyum.

## Positivt

-Um eitt stórt fund verður gjørt í Føroyum, og tað verður td. Statoil, sum finnur oljuna, heldur tú eitt lítið samfelag sum tað føroyska megnar at handfara hana?

-Vit eiga ikki at spekulera í einum fundi longu nú, men tað finnast nógvar royndir frá Noregi og øðrum londum, hvussu man eigur at handfara eina slíka støðu. So verður hetta hugsað væl ígjøgnum, ivist eg ikki í, at eitt oljufund fer at vera sera positivt fyri Føroyar.

## Vandi

-Røddir eru frammi um, nú eftir vanlukkuna í Meksikoflógvanum, at tað er ikki heilt vandaleyst at bora eftir olju á djúpum vatni við Føroyar.

-Oljuídnaðurin fer at læra av vanlukkuni í Meksikanska flógvanum. Vit hava rikið oljuvirksemi í Noregi í skjótt 40 ár, vit hava borað 4500 brunnar, og vit hava enn ikki staðfest nakrar negativar umhvørvisavleiðingar á landi. So ídnaðurin hevur eina sera stóra ábyrgd, tá tað kemur til umhvørvi, heilsu og trygd.

-So føroyingar eiga ikki at bera ótta fyri eini boring á djúpum vatni?

-Tað vil altíð vera knýtt ein váði við alt vinnuligt virksemi, men eg haldi, at oljuvinnan er góð til at handfara henda váða.

## Fegnast

-Føroyingurin Rúni M. Hansen hevur ábyrgdina av leitingini hjá Statoil í Føroyum og Grønlandi, og nú er hann eisini vorðin ovasti leiðari fyri týðandi virksemi hjá Statoil í Europa og Norðurafrika. Hvat halda tit í Statoil um hansara avrik?

-Vit eru glaðir um at hava Rúna her hjá okkum. Hann ger eitt sera gott arbeiði fyri Statoil. Vit arbeiða við at byggja upp eitt globalt felag, og tá tørvar okkum bæði kompetansu og góðar medarbeiðarar úr allari verðini. So eg kann bert siga, at eg havi góð viðurskifti við Rúna, sum eg haldi ger eitt sera gott arbeiði.

jan@sosialurin.fo



*Á oljuráðstevnuni í Stavanger fingu Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavn og Johan Dahl, landsstýrismaður í oljumálu eisini høvi at heilsa uppá Statoilstjóran Helge Lund.*

Mynd: Jan Müller

# Føroyingur týðandi ábyrgdarstarv í norska Statoil

**STARV** Alt fleiri føroyingar finna sær størv í altjóða oljuvinnuni, og onkur av teimum røkka rættiliga langt. Ein teirra, sum hevur fingið fótin fastan í altjóða oljuvinnuni, er fuglfirðingurin, Rúni M. Hansen

Jan Müller
*Stavanger*

Hann hevur seinastu árini verið stjóri fyri Statoil Exploration í Føroyum og hevur eisini umsitið týðandi ábyrgdarstarv í risastóra norska oljufelagnum Statoil.

Nú frættist í Statoilumhvørvinum i Stavanger, at Rúni M. Hansen er settur sum stjóri fyri Europa og Nordur Afrika innan "commercial and negotiation", sum tey kalla tað innan oljuverðina. Hetta ábyrgdarøki hevur hann fingið aftrat tí hann hevur í dag sum stjóri fyri Føroyum og Grønlandi. Sum skilst so umfatar starvsøkið allan vinnuliga- og samráðingarpartin fyri Europa og Norður Afrika, bæði yvirfyri myndugleikum og øðrum altjóða oljufeløgum.

Hetta er eitt stórt ábyrgdarøki hjá Statoil, tí Statoil er rættuliga virkið bæði runt um í Europa og Norður Afrika. Rúni M. Hansen ynskir ikki sjálvur at gera stórvegis viðmerkingar til hetta, uttan at tað er ikki heilt ókent fyri hann, tí hann hevur arbeitt innan líknandi øki áður, um enn hetta umfatar meira enn higartil.

## Spennandi

Rúni Hansen vil tó siga so mikið, at nýggja arbeiðsøkið er sera spennandi. Nógv virksemi fer fram her, og tí er nógv fokus á júst hetta økið. Spurdur hvussu tað er at samskipa, tá fólkið situr spjatt runt í fleiri londum, sigur hann, at tað er ein avbjóðing, men at hetta er ikki óvanligt í oljuvinnuni.

Statoil er sera virkið í Føroyum og er fyristødufelag fyri seks loyvum og skal bora 2 brunnar innan ikki alt ov langa tíð . Tá vit spurdu Rúna, um hansara nýggja arbeiðsuppgáva hjá Statoil fer at hava við sær, at Føroyar verða lægri raðfestar framyvir, svarar hann, at tað fer tað ikki. Tað verður í løtuni nógv orka løgd í Føroyaøkið, sum Statoil framvegis raðfestir høgt.

jan@sosialurin.fo



*Rúni M Hansen og Helge Lund, Statoilstjóri vóna at fáa eitt mennandi samstarv, sum eisini fer at gagna Føroyum*

Mynd Jan Müller.